Smart og smakkleyst

Eggjandi undirklæði á smágentukroppum kunnu senda signal, ið meira enn so kunnu missfatast av tilkomnum. Hetta kann føra til eina sera óhepna støðu, heldur sálarfrøðingur.

Dia Midjord

Anna Debes Hentze, sálarfrøðingur

Mest sannlíkt liggja hópin av bleytum pakkum við undirklæðum undir jólatrænum í ár. Uttan at hava hugsað stórvegis um tað, hevur omman ella mamman keypt tað nýggjasta nýggja av barnaundirklæðum til 9 ára gomlu gentuna.

Hesi undirklæði eru lekkur og nærum lík brósthaldarum og trussum, ið tær tilkomnu kvinnurnar nýta. Og júst hetta er ein trupulleiki. Tí tað er ein sannroynd, at frek undirklæði sipa til tað seksuella og seta ferð á hugaheimim hjá flestu mannfólkum.

Anna Debes Hentze, sálarfrøðingur, er heldur ikki í iva, tá vit spyrja, hvørjar tankar hon ger sær um hesi tingini?

– Smágentukroppurin við teimum eggjandi undirklæðunum, kann signalisera nakað, ið slettis ikki er ætlanin. Onkur kann missfata støðuna og blíva eggjaður av hesum. Hetta kann so elva til eina keðiliga støðu, ið smágentan langt í frá er klár til, sigur sálarfrøðingurin

Veit ikki betur

Smágentan, sum letur seg í slík eggjandi undirklæði, dugir ikki at skilja støðuna. Hon sær bert tað smarta, tí hon líkist mammuni ella onkrari aðrari fyrimynd.

– Undirklæði er bert ein lítil partur av øllum tí, sum brúkt verður at lata børnini í ein vaksnamannaham. Men hvussu skal tað verða, tá eitt nú trøllvaksnu kvinnurnar í Spice Girls síggja út og føra seg fram sum ungar gentur, spyr sálarfrøðingurin.

Anna Debes Hentze heldur ikki, at tað er positivt at koma ov tíðliga inn í vaksnamannaheimin, tí børnini eru ikki búgvin til tað.

– At barndómurin styttist og styttist er eftir mínari meting óheppið og ein ikki sørt skeiv gongd, heldur sálarfrøðingurin.

Nær eru so børnini klár at trína inn í vaksnamannaheimin?

– Eg haldi, at tað er umráðandi, at børn sleppa at verða børn so leingi sum gjørligt. Tá tey eru um 13/14 ára aldur, eru tey toluliga búgvin at trína inn í vaksnamannaheimin, heldur Anna Debes Hentze, sálarfrøðingur.

Forsølan gongur væl

Forsølan til nýggjárskonsertina við Frændum gongur væl

Tað eru longu seld fleiri enn 500 atgongumerki til nýggjárskonsertina í ítróttarhøllini á Hálsi

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Forsølan av atgongumerkjum til nýggjárskonsertina við Frændum í ítróttarhøllini á Hálsi gongur væl.

Eini 500 atgongumerki eru longu seld til konsertina, sum verður fríggjakvøldið 29. november.

Nýggjárskonsertin hevur ikki verið hildin seinastu tvey árini, tí ítróttarhøllin á Hálsi hevur ikki vilja víst slíkum tiltøkum, og fyrireikararnir – sum er Kyndil – hava ikki havt áhuga í brúka Badmintonhøllina.

Nú hevur høllin á Hálsi latið hurðina upp á glopp, og harðar treytir eru settar teimum, sum skulu skipa fyri konsertini.

Betri vaktarhald

Ein orsøk til at høllini á Hálsi hevur útihýst konsertum á náttartíð hevur verið, at nógv herverk hevur verið gjørt í høllini, men fyrireikararnir av nýggjárskonsertini ætla at fyribyrgja hesum við øktum vaktarhaldi.

Vanligt var, at fleiri bólkar spældu á nýggjárskonsertini, men í ár fer Frændur at spæla nakað, teir rópa eitt hittshow. Tað vil siga, at væl umtókti bólkurin fer at tríva í allar teir kendu sangirnar hjá bólkinum.

Kvøldið eftir nýggjárskonsertina – tað vil siga leygarkvøldið 30. desember – fer Frændur á pallin í ítróttarhøllini á Kambsdali, har teir fara at spæla líknandi konsert, sum hana í Havn.

Hetta árið royndist verri enn í fjør

Fiskiskapurin hevur verið betri, men prísurin hevur verið verri. Og oljan hevur verið tvær ferðir so dýr í ár, sum hon var í fjør.

FISKISKAPUR
Áki Bertholdsen

Kubatrolararnir hava fiskað ímillum 9.000 og 10.000 tons í ár og tey vórðu avreidd fyri 70 milliónir krónur. men fíggjarliga úrslitið er verri í ár, enn tað var í fjør

Árið í ár royndust ikki heilt so væl hjá gomlu kubatrolarunum, sum árið í fjør.

Olaf Olsen reiðari á teimum átta kubatrolarunum, sum partrola, sigur, at sum heild hevur fiskiskapurin í ár verið eitt lítið sindur frægari enn í fjør. Men sjálvur hevur hann mest hug til at kalla hetta eitt miðalár hjá bátunum, tá ið hugsað verður um tey seinastu 20 árini.

Sostatt hava teir í ár fiskað ímillum 9.000 og 10.000 tons, og tilsamans vórðu tey avreidd fyri 70 milliónir krónur.

Men kortini er fíggjarliga úrslitið í ár ikki so gott, sum tað var í fjør. Og tað eru tað tvinnandar grundir til.

– Í fyrra lagi hevur oljan verið tvær ferðir so dýr í ár í miðal, sum hon var í fjør, og tað ger fíggjarliga úrslitið einar 4-5 milliónir verri, enn tað annars hevði verið, um oljan ikki var dýrkað so nógv, sigur Olaf Olsen.

– Í øðrum lagi er prísurin á upsa sum heild eitt sindur verri í ár, enn hann var í fjør. Í ár hevur miðalprísurin verið slakar fimm krónur.

– Og tá ið 80% av tí, sum bátarnir fiska, er upsi, er tað skilligt, at tað sæst aftur í fíggjarliga úrslitinum.

Hetta merkir, at upsin blívur við at vera ein bíligur fiskur, hóast eftirspurningurin eftir fiski sum heild er vaksin nógv, og prísirnir eisini eru hækkaðir. Eitt nú heldur Olaf Olsen, at óttin í Evropa fyri salmonellu og neytaði hava givið bæði eftirspurninginum og prísinum eitt skump uppeftir, men upsin fylgir altso ikki við.

Trupult at endurnýggja

Kubatrolararnir eru nú rættiliga gamlir. Teir vórðu bygdir í 1970, men vóru nýístandgjørdir , allir sum teir vóru, seinast í sjeytiárunum.

Sostatt eru teir rættiliga gamlir nú, og Olaf Olsen sigur, at tað hevði verið rætt at skift teir út.

Men tað dugir hann ikki at síggja nakrar møguleikar til, sum støðan er nú.

– Í løtuni er tað trupult at fáa gomul skip at mala runt. Enn verri er tað at fáa nýggj skip av mala runt. So tað verður valla hugsingur um at skifta út í løtuni.

Olaf Olsen sigur, at tað man valla vera nakað av teimum nýggjaru skipunum, sum klárar at forrenta tað, tey áttu at forrenta eftir tí, tey kostaðu at byggja. Tey flestu eru avskrivað og farin at heysin, summi meiri enn eina ferð, og tað ger, at tey eru lutfalsliga bílig. Men at byggja nýtt, verður trupult.

Hann sigur, at fer politiski myndugleikin at gera eftir tilmælinum frá Búskaparráðnum um at krevja avgjald fyri at sleppa at fiska, so fer tað at gera støðuna enn truplari.

Vilhelm Johannesen:

Andstøðan skapar samgongupolitikkin

Framsøgumaður Javnaðarfloksins í skattamálum, Vilhelm Johannessen, heldur, at tað í verulei kanum er andstøðan, ið leggur leistin í førda skattapolitikkinum. Landsstýrið broytir andstøðuuppskot og samtykkir tey sum síni egnu

SKATTAPOLITIKKUR
John Johannessen

– Tað er løgi, at politikkurin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum skal vera at broyta andstøðuuppskot og síðani fáa tey samtykt sum síni egnu.

Hetta heldur Vilhelm Johannesen, framsøgumaður Javnaðarfloksins í fíggjar- og skattamálum, sum hevur havt ein stóran leiklut í at snikka saman skattalættauppskotið hjá andstøðuni, sum løgtingið vrakaði á tingfundinum mikudagin.

– Tá okkara uppskot kom til fyrstu viðgerðar, skundaði Karsten Hansen sær at koma í tingið við einum uppskoti um skattalætta, sum líktist okkara rættuliga nógv. Eg eri vísur í, at komu vit ikki við okkara uppskoti, hevði einki uppskot um skattalætta komið frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, sigur Vilhelm Johannesen.

Barnafrádrátturin gott dømi

Størsti munurin á skattalættauppskotinum hjá andstøðuni og tí hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum var, at uppskotið hjá andstøðuni legði upp til at hækka barnafrádráttin við 2.000 krónum, soleiðis at hann kom upp á 6.000 krónur.

Hetta var eisini tað, sum undir 2. viðgerðunum av mongu uppskotunum um skattaábøtur í tinginum mikudagin elvdi til stríð í samgonguni. Fólkaflokkurin hevði hug at taka undir við uppskotinum, men tordi ikki fyri Tjóðveldisflokkinum, sum eigur landsstýrismannin í fíggjarmálum. Fólkaflokkurin ræddist samgonguslit.

Dempari varð tó lagdur á stríðið, tá løgtingið samdist um, at uppskotið hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum skuldi viðgerðast í fíggjarnevndini eina løtu og síðani koma afur í tingið. Undir hesi viðgerðini boðaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at Fíggjarmálastýrið arbeiðir við einari ætlan um at hækka barnafrádráttin. Hetta var eisini tað, sum at enda fekk Fólkaflokkin til at atkvøða fyri uppskotinum hjá Karsten Hansen.

– Hetta er ógvuliga løgi. Karsten Hansen hevur nevniliga als ikki arbeitt við at hækka barnafrádráttin í sínum uppskoti. Tað kom tíðiliga fram undir viðgerðini mikumorgunin. Hetta er nakað, ið brádliga stakk seg upp, eftir at Fólkaflokkurin heilt greitt undir viðgerðini mikudagin hevði víst á, at hann vildi hava barnafrádráttin hækkaðan, eins og andstøðan skjeyt upp, sigur Vilhelm Johannesen.

– Sama er eisini galdandi fyri onnur uppskot, andstøðan kemur við, millum annað uppskotið um at lækka avgjaldið á bensini og uppskotið um at avtaka karensdagarnar fyri tímalønt, vísir Vilhelm Johannesen á.

Kortini ásannar Vilhelm Johannesen, at andstøðan má fegnast um, at samgongan vil kopiera andstøðuuppskotini.

Hækka skattaprosentið í Havn

Tórshavnar Býráð hevur á eyka býráðsfundi einmælt samtykt at hækka skattaprosentið. Hetta er orsakað av, at løgtingið mikudagin samtykti at hækka botnfrádráttin

SKATTAPROSENT
John Johannessen

Skattaprosentið í Havn skal hækka. Hetta samtykti Tórshavnar býráð á eyka býráðsfundi seinnapartin hósdagin.

Avgerðin er tikin eftir at løgtingið mikudagin við aðru viðgerð samtykti at hækka botnfrádráttin úr 17.000 krónum til 19.000 krónur í 2001 og 21.000 krónur í 2002.

Í viðmerkingunum til løgtingslógaruppskotið um at lækka botnfrádráttin stendur, at hetta fer at kosta kommununum 13 milliónir krónur tilsamns hvørt árið. Tórshavnar býráð hevur roknað út, at hetta merkir, at kommunan fær 5,2 milliónir krónur minni í kassan komandi ár, enn kommunan roknaði við, tá hon 14. november í ár samtykti fíggjarlógina fyri 2001.

Býráðið í Havn heldur, at avgerðin hjá løgtinginum setir kommunala sjálvræðið til viks, tí løgtinið hevur viðgjørt og samtykt eitt lógaruppskot, ið tekur støðið undan einmælt samtyktu fíggjarætlanini hjá býráðnum. Hetta sama heldur býráðið, at løgtingið ger, tá tað arbeiðir við einum lógaruppskoti um at flyta útreiðslurnar av fríplássum innan barnaansing frá landinum til kommunurnar. Og harafturat er hetta eisini nakað, ið fer at taka grundarlagið undan fíggjarætlanunum hjá kommununum.

Hóast Tórshavnar býráð hevur samtykt at hækka skattaprosentið, kann hetta ikki gerast fyrr enn Kommunala Eftirlitið hevur givið loyvi til tess.